Fylgiskjal 2

Úr frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum týsdagin 17. november 2020 kl. 14.30-16.15.

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Útseta og flyta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir frá 2020 til 2021, strika treytina um veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við ávíst slag av vinnuligum royndum og verkætlanum ávikavist fyri royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir)

Fiskivinnuráðið hevur eina viðmerking í samband við flyting av ófiskaðum kvotum yvir ár:

Flyting av kvotu
Greitt er, at ein lutfalsliga stórur partur av føroysku makrelkvotuni neyvan verður fiskaður í 2020. Uppgerð frá Vørn vísir, at 22.604 tons av kvotuni ikki eru veidd higartil í ár. Afturat hesum skulu leggjast 4.260 tons, ið eru ætlað til vinnuligar royndir og verkætlanir smb. §49, stk. 1, sum ikki eru lutað út í ár. Hesin parturin av kvotuni verður tó fluttur til 2021, um lógaruppskotið verður samtykt. Hesum tekur Fiskivinnuráðið undir við.

Ein lítil partur av teimum 22.604 tonsunum verða flutt til 2021, tí at hvør einstakur rættindahavari hevur møguleika at flyta upp til 10% av síni eginkvotu til 2021. Hetta er tó bert nóg mikið til at flyta ein lítlan part av tí kvotu, sum ikki er fiskað í 2020, til 2021.

Ivasamt er, um landsstýrismaðurin hevur heimild at flyta so stórar nøgdir av kvotu frá einum ári til tað næsta við støði í verandi lóg, har §34, stk. 4 sigur, at landsstýrismaðurin í serligum førum kann flyta ein størri part yvirum ársskiftið.

Fiskivinnuráðið heitir á myndugleikarnar um at flyta alla ta ófiskaðu makrelkvotuna frá 2020 til 2021. Hetta krevur helst, at landsstýrismaðurin fær eina víðkaða heimild í lógini at fremja slíka flyting.

Fiskivinnuráðið vísir á, at talan er um týðandi føroysk áhugamál, og tí er umráðandi, at myndugleikarnir gera sítt til, at henda kvotan kann fáast til høldar komandi ár.
Víst verður á, at veiðigjald verður lagt á størsta partin av hesum kvotum, og hetta hevði komið landskassanum til góðar, heldur enn at kvoturnar fella burtur í ár. Eisini hevði hetta komið føroyskum manningum og reiðaríum til góðar, um hesar kvotur verða veiddar komandi ár ístaðin.

Umboðið fyri Meginfelag Útróðrarmanna vísir á, at bólkur 4 og 5 hava verið fyri vanbýti, tá ið umræður tillutan av makrelkvotu og sildakvotu. Eingin orsøk tykist fyri hesum vanbýti, og heitt verður tí á landsstýrið og løgtingið um at bólkur 4 og 5 fáa somu treytir sum línuskipini í bólki 3 fáa, t.e. tillagaðar eginkvotur.

Umboðið fyri Føroya Reiðarafelag vísir á egið hoyringsskriv, sum verður sent Fiskimálaráðnum.

Fundarfrásøgn lisin og góðkend.

Fundur lokin kl. 16.15

Jóanna Djurhuus, formaður Jákup Mørkøre, skrivari